# Postfelag tekur okkum su



**Fakfelagið hjá starvsfólkunum á Postverkinum umboðar bert postboðini, sum telja væl minni enn helvtina av samlaða starvsfólkatalinum. Hetta siga tvær kvinnur, ið eru deyða troyttar av teirra egna felag, sum tær halda forðar fyri allari menning á Postverkinum. Stovnurin hevur harðliga brúk fyri at verða nútímansgjørdur. Einasta forðingin er Postfelag Føroya, siga Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri tveimum vikum vóru 15 starvsfólk uppsøgd á Postverki Føroya. Uppsagnirnar skaptu mikla øsing í Postfelagnum og í Starvsmannafelagnum, men fyri stóran part av limunum í felagnum, komu uppsagnirnar ikki óvart. Hetta siga tær báðar Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir, sum báðar arbeiða á postavgreiðsluni í Havn. Tær vísa á, at á fýra fundun runt um í landinum í apríl fáa øll starvsfólkini at vita, at um tey ikki ganga við til at gera broytingar í arbeiðsgongdini, so gerst úrslitið niðurskurður, tí raksturin hjá felagnum annars ikki hongur saman.

Útmeldingarnar frá leiðsluni í Postverkinum fyri góðum tveimum mánaðum síðani vóru so mikið álvarsligar, at Postfelagið átti at kalla inn til eykaaðalfund fyri at viðgera støðuna, halda Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir.

- Postfelagið heldur okkum fullkomiliga uttanfyri, tí vit fáa onki at vita um,

*Hesar báðar vilja ikki longur finna seg í arbeiðsháttinum hjá Postfelag Føroya, sum tær halda stýrir diktatoriskt, og sum tær ikki føla umboðar tær á nakran hátt. Frá vinstru Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir*
*Mynd: Sunva Lassen*